

# Lurtaravinarlig musikkstevna

**TÓNLEIKUR Verkskeið, festligasta íkasti, solistar og annað. Harmoniorkestrið GHM skipar fyri árligu musikkstevnuni, sum hesaferð verður í Norðurlandahúsinum 19. til 21. mai. Høvuðskonsertin verður leygardagin**

Dagfinn Olsen

Harmoni- og hornorkestur úr øllum landinum hittast árliga dýra biðidagsvikuskiftið. Eins og undanfarin ár verður, umframt høvuðskonsertina, eisini hildið eitt verkskeið og ein konsert við skúlaorkestrum. Í ár verður Føroya Landsorkestur eisini partur av skránni.

Musikkstevnan 2011 fær vitjan úr Íslandi. Skúlaorkestrið av Akureyri og Akureyri Big Band fara eisini at seta sín dám á hesa musikkstevnuna.

Hóskvøldið 19. mai hava Føroya Landsorkestur og Akureyri Big Band konsert í Norðurlandahúsinum.

Fríggjadagin, dýra biðidag, er dagurin, tá føroysku skúlaorkestrini hava konsert. Á somu konsert framførir eisini skúlaorkestrið av Akureyri.

Hósdagin og fríggjadagin verður verkskeið, har føroyskir yrkistónleikarar verða skeiðshaldarar. Úrslitið av verkskeiðnum verður at hoyra á samkomu fyri skúlaorkestrum og verkskeiðsluttakarum fríggjadagin.

Høvuðskonsertin á musikkstevnuni verður seinnapartin leygardagin 21. mai.

Í ár roynir GHM at seta nakrar karmar um konsertina, fyri at gera hana so lurtaravinarliga sum gjørligt. Orkestrini hava fingið ein leist at velja eftir til tónleikaframførsluna. Orkestrini kunnu velja trý tónleikastykki: Nýggj føroysk komposition, swing, stykki við solisti, filmstónleikur ella marsjur.

Konsertin leygardagin verður partvíst skipað sum ein kapping. Teir tríggir dómararnir skulu meta um bestu samansettu skrá, besta spælandi orkestri og festligasta íkast. Vinningar verða eftir heildarmeting latnir trimum orkestrum.

Fólk í øllum aldri manna føroysku harmoni- og hornorkestrini. Musikkstevnan er árliga hæddarpunktið hjá hesum tónleikarum, har høvi er hjá orkesturlimum úr øllum landinum at hoyra onnur orkestur, og at hitta aðrar spælarar.

Dýrabiðidag á hvørjum ári møtast øll blásiorkestrini til musikkstevnu. Orkestrini skiftast um at verða vertur, og stevnunar hava verið hildnar kring alt landið síðani 1966.

*dagfinn@sosialurin.fo*

